**UTTAN ÚR HEIMI**

# Jarðaður býur undan kavi

**Fornfrøðingar halda seg hava funnið ein indonesiskan bý, sum hvarv undir øsku og gróti í einum gosi fyri næstan 200 árum síðani**

FORNFRØÐI
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Gosið úr Mount Tambora tann 10. apríl í 1815 er tað størsta, sum menn vita um at siga. Fjallið sendi umleið 400 milliónir tons av svávulsýru upp upp í atmosferuna, og tað hevði við sær, at summarið í 1815 gjørdist tað kaldasta nógvastaðni í heiminum. Í Miami í USA var frost í juni og juli, og vínakrarnir í Fraklandi og Týsklandi bóru onga frukt tað árið.

Tann størsti skaðin var kortini á indonesisku oynni Sumbawa, sum varð løgd undir ovurtjúkk løg av øsku og gróti. Alt livandi á oynni doyði, og hildið verður, at gosið kravdi umleið 80.000 mannalív.

Nú hava fornfrøðingar hjá einum lærdum háskúla í USA funnið mannabein og ymsar lutir á oynni, og teir ivast ikki í, at teir eru komnir niður á høvuðsbýin, sum eina ferð var á Sumbawa. Haraldur Sigurðsson, sum stendur fyri kanningunum, sigur við AP, at helst hava umleið 10.000 fólk búð í býnum, tá hann bleiv lagdur undir heilt sum Pompeii á sinni.

Tíðliga í 19. øld høvdu bretskir og franskir vísindamenn fingið áhuga fyri fólkinum á Sumbawa, tí tey tosaðu eitt mál, sum eingin annar tosaði. Men hetta bleiv ongantíð kannað, tí gosið beindi fyri øllum á oynni.

– Málið varð útruddað, men vit royna at fáa hesi fólkini at tosa aftur við at grava tey undan, sigur Haraldur Sigurðsson við AP.

## Dømdir eftir ferjuvanlukku

Ein dómstólur í Grikkalandi hevur dømt skiparan og yvirstýrimannin á ferjuni ”Express Samina” ávikavist 16 og 19 ára fongsul, og tríggir aðrir av manninginI skulu sita ímillum átta ár og 15 mánaðir í fongsli.

Skiparin og yvirstýrimaðurin vórðu dømdir fyri dráp og onnur lógarbrot í sambandi við vanlukkuna, tá ”Express Samina” fór á land á oynni Paros í Egearahavinum fyri seks árum síðani. Vanlukkan kravdi 80 mannalív. Hinir av manninginI vórðu dømdir fyri onnur brot. Eitt nú var onkur farin av skipinum uttan at hava fingið tað neyðuga loyvið frá skiparanum.

Rætturin dømdi eisini tvey starvsfólk hjá reiðarínum fýra ára fongsul fyri grov brot á trygdarreglurnar við ferjusigling. Í úrskurðinum stendur, at skipið var í forsvarligum standi, men at hvørki manningin ella reiðaríið hildu galdandi trygdarreglur.

# Umdømið hjá Bush í botni

**Bara ein triðingur av amerikanarunum siga seg vera nøgdar við forsetan. Uppaftur verri er við varaforsetanum**

USA
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*



*Nú er Bush, forseti, so illa umtóktur í heimlandi sínum sum ongantíð fyrr*

*Mynd: Reuters*

Fyri einum mánað síðani søgdu 42 prosent av amerikanarunum, at teir vóru nøgdir við George W. Bush, forseta og tað arbeiðið, sum hann gjørdi, men tann seinasta mánaðin er umdømi hansara versnað nógv.

Ein kanning, sum sjónvarpið CBS almannakunngjørdi í gjár, vísti, at nú eru bara 34 prosent nøgd við forsetan og politikk hansara. So illa umtóktur hevur forsetin ikki verið síðani í oktober, tá 35 prosent søgdu seg styðja hann. Tað var beint eftir, at ódnin ”Katrina” hevði herjað teir syðru statirnar, og júst sum verjumálaráðið hevði boðað frá, at kríggið í Irak hevði kostað meiri enn 2.000 amerikonskum hermonnum lívið.

Eygleiðarar siga, at nógvir amerikanarar eru ávirkaðir av gongdini í Irak, og at tað ger sítt til, at forsetin er so illa umtóktur. Eitt annað mál, sum ørkymlar fólk, er, at Bush hevur latið eitt felag í Dubai umsita amerikanskar havnir, sjálvt um kanningar vístu, at 70 prosent av amerikanarunum vóru ímóti tí.

CBS sigur, at tann einasti glottin hjá Hvítu Húsunum er, at amerikanararnir bera yvir við Dick Cheney, varaforseta, sum var so óheppin at raka ein vinmann á einari veiðiferð í Texas herfyri. Men tað er lítil uggi í hesum, tí sambært kanningini hjá CBS eru bara 18 prosent av amerikanarunum nøgdir við varaforsetan.

## Myrdu býráðslimir

Vápnaðir uppreistrarmenn myrdu mánadagin átta býráðslimir, sum hildu fund á einum gistingarhúsi har suðuri í Kolombia. AP skrivar, at álopsmenninir vóru í løgreglubúna, og tí óraði eingin ilt, tá teir komu inn á gistingarhúsið.

Álopið var í býnum Rivera, sum FARC fyrr hevði valdið í, men sum stjórnarherurin nú hevur ræðið á.

Kolombisku myndugleikarnir siga, at álopsmenninir vóru úr uppreistrarfelagsskapinum FARC, og Alvaro Uribe, forseti, fordømdi álopið. Hann kallaði FARC ein yvirgangsfelagsskap og segði, at stjórnin fer at halda fram við bardaganum ímóti yvirganginum. Alvaro Uribe vanmn seinasta forsetavalið, tí hann lovaði at gera enda á ófriðinum í Kolombia.

## Átak ímóti pedofilum

Í amerikanska statinum Mississippi eru myndugleikarnir farnir undir eitt átak, sum er ætlað at verja børn og ung ímóti kynsligum ágangi.

Átakið hevur vakt ans, tí millum annað hava myndugleikarnir gjørt av at almannakunngera stórar myndir av fólki, sum eru dømd fyri kynsligan ágang ímóti børnum og ungum. Myndirnar verða settar á stórar plakatir, sum síðani verða hongdar fram við høvuðsvegunum.

Í nógvum amerikonskum statum hava fólk atgongd til upplýsingar um fólk, sum eru dømd fyri kynsligan ágang ímóti børnum og ungum, og í Texas kunnu fólk fáa slíkar upplýsingar á alnótini.

Myndugleikarnir vilja vera við, at hetta virkar fyribyrgjandi, men fleiri felagsskapir vísa á, at tað er skeivt at forfylgja fólki, sum hava fingið dóm, og sum hava sitið í fongsli fyri brotsverkið. Felagsskapirnir siga, at átøk sum tað í Mississippi gera tað uppaftur truplari hjá teimum dømdu at byrja eitt nýtt og betri lív.

Í amerikanska statinum Mississippi eru myndugleikarnir farnir undir eitt átak, sum er ætlað at verja børn og ung ímóti kynsligum ágangi.

Átakið hevur vakt ans, tí millum annað hava myndugleikarnir gjørt av at almannakunngera stórar myndir av fólki, sum eru dømd fyri kynsligan ágang ímóti børnum og ungum. Myndirnar verða settar á stórar plakatir, sum síðani verða hongdar fram við høvuðsvegunum.

Í nógvum amerikonskum statum hava fólk atgongd til upplýsingar um fólk, sum eru dømd fyri kynsligan ágang ímóti børnum og ungum, og í Texas kunnu fólk fáa slíkar upplýsingar á alnótini.

Myndugleikarnir vilja vera við, at hetta virkar fyribyrgjandi, men fleiri felagsskapir vísa á, at tað er skeivt at forfylgja fólki, sum hava fingið dóm, og sum hava sitið í fongsli fyri brotsverkið. Felagsskapirnir siga, at átøk sum tað í Mississippi gera tað uppaftur truplari hjá teimum dømdu at byrja eitt nýtt og betri lív.

# Ein kvinna skal stýra Jamaica

**Fyri fyrstu ferð fær Jamaica eina kvinnu til stjórnarleiðara**

JAMAICA
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Fólksins Tjóðskaparflokkur í Jamaica hevur valt ta 60 ára gomlu Portia Simpson Miller til floksformann, og tað ber í sær, at hon tekur við sum forsætisráðharri um nakrar vikur. Verandi forsætisráðharrin, P. J. Petterson, hevur kunngjørt, at hann leggur frá sær eftir 14 ár í embætinum.

Á floksformansvalinum sunnudagin vann Portia Simpson Miller á ráðharranum í trygdarmálum, Peter Phillips. Tey flestu væntaðu, at hann fór at vinna, men mong hava funnist at honum, tí hann hevur ikki megnað at steðga í altsamt veksandi harðskapinum í landinum. Sambært BBC doyggja umleið 4.000 fólk á hvørjum ári av harðskapi, men Portia Simpson Miller lovar, at nú skal vend koma í.